## UTTAN ÚR HEIMI

### Týskland ger kvetti

Týskarar keypa meiri enn ein ein triðing av øllum gassinum, sum kemur upp úr norska havbotninum, men sjálvt um tað er tann norski staturin, sum er seljari, fær tann týski ríkiskassin meiri burtur úr handlinum enn tann norski.

Sambært Aftenposten endar umleið ein fimtapartur av søluvirðinum í norska ríkiskassanum, og í fjør svaraði tað til einar seks milliardir norskar krónur. Men av tí at týska stjórnin krevur 50 oyru í avgjaldi fyri hvønn rúmmetur av gassi, sum verður innfluttur, fekk týski ríkiskassin einar 12 milliardir norskar krónur burtur úr norska gassinum í fjør, skrivar blaðið.

Kanningar hava eisini víst, at týsku brúkararnir rinda meiri fyri gass enn fólk í øðrum vesturevropeiskum londum. Tað hevur fingið tey norsku oljufeløgini at stúra fyri, at týskarar fara at skerja sína gassnýtslu, men enn er eingin broyting hend í so máta, skrivar Aftenposten.

### Tvíburðar snýttu fangavørðar

Ein 18 ára gamal svii, sum herfyri varð dømdur tíggju mánaðar fongsul fyri harðskap og stuldur, slapp mánadagin úr fongslinum Kronoberg í Stockholm.

Tað vísti seg, at tann 18 ára gamli hevði havt vitjan av tvíburði sínum. Inni í klivanum hevði fangin latið seg í klæðini hjá bróðurinum, sum sjálvur var farin í fangabúnan. Tá vitjunartíðin var liðug, spákaði fangin út um fongsulsdyrnar, uttan at nakar av fangavørðunum óraði ilt. Bróðurin fór í klivan at sita.

Tað gekk kortini ikki meiri enn ein tími, so tímdi bróðurin ikki at sita í klivanum meiri, men greiddi fangavørðunum frá, hvussu vorðið var. Løgreglan varð boðsend, og hon kundi við fingramerkjum staðfesta, at tað var tann skeivi maðurin, sum sat í fongsli. Hann varð latin í leysur, men tann flýddi er ikki funnin enn. Løgreglan roknar kortini við at finna hann aftur skjótt.

### Akupunktur ímóti gikt

Amerikanskir granskarar siga seg vera komnar eftir, at akupunktur kann hjálpa fólki, sum hava gikt í knøunum.

Sambært granskaranum Stephen E. Straus er hetta fyrstu ferð, at ein umfatandi kanning hevur víst, at akupunktur kann hjálpa ímóti slitgikt í knøunum. 570 fólk í aldrinum frá 50 árum og uppeftir tóku lut í kanningini. Summi fingu viðgerð við akupunktur, men øll hildu fram við at taka tann heilivág, sum læknarnir høvdu givið teimum ímóti slitgikt. Tað vísti seg rættiliga skjótt, at tey, sum fingu akupunktur, høvdu minni pínu í knøunum og høvdu lættari við at ganga enn frammanundan, sigur Stephen E. Straus.

Amerikonsku granskararnir siga, at tey, sum fingu viðgerð við akupunktur, høvdu 40 prosent minni pínu aftaná, og at tey kundu brúka knøini 40 prosent meiri enn frammanundan.

### Upp á turt

Tann seinasti kavbáturin hjá danska herflotanum, sum hevur verið í drift, "Sælen", hevur nú verið í sjónum fyri seinastu ferð.

Fyrradagin varð kavbáturin lyftur upp á land uttan fyri Tøjhusmuseet í Keypmanahavn, tí í framtíðini verður hann ein partur av savninum. Ætlanin er, at áhugað skulu sleppa niður í kavbátin at hyggja at útgerðini, sum har er, og so kunnu tey samstundis fáa eina mynd av, hvussu tað er at sigla við einum kavbáti, skrivar Politiken.

"Sælen" var í Persaflógvanum undir krígnum í Irak sum ein partur av danska stuðlinum til kríggið har.



*Rumaisa Rahman vigaði bara 243,8 gram, tá hon varð fødd. Her hevur ein av læknunum lagt aðra hondina undir liðina á henni fyri at vísa, hvussu lítil hon var*

*Mynd: Reuters*

# Hon vigaði bara 243,8 gram

**Heimsins minsti nýføðingur, Rumaisa Rahman, vigaði bara 243,8 gram, tá hon varð fødd. Tvíburðarsystirin vigaði 567 gram**

SMÁ BØRN

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Rumaisa Rahman varð borin í heim á Loyola University Medical Center í amerikanska býnum Marywood fyri trimum mánaðum síðani. Sama dag kom tvíburðarsystir hennara, Hiba, í verðina.

Nú tríggjar mánaðir seinni eru tær báðar komnar so mikið fyri seg, at tær sleppa heim til foreldrini, sum eru av indiskum uppruna, skrivar AP.

Rumaisa vigaði bara 243,8 gram og var 25 centimetrar long, tá hon varð fødd. Hon vigaði sostatt 36,8 gram minni enn tann higartil minsti nýføðingurin, sum kom í verðina á tí sama sjúkrahúsinum fyri 15 árum síðani. Tvíburðarsystirin Hiba var eisini lítil. Hon vigaði 567 gram.

Tær báðar genturnar vórðu føddar, tá mamman var komin í 26. viku. Kanningar høvdu avdúkað, at mamman hevði alt ov høgt blóðtrýst, og læknarnir stúrdu fyri, at børnini kundu fáa mein av tí. Tí bleiv avgjørt at taka tey við keisaraskurði.

Fyrradagin vórðu fjølmiðlarnir bodnir á sjúkrahúsið at síggja tær báðar smáu. Har greiddu læknarnir frá, at tað er einki, sum bendir á, at tær fara at fáa nakað mein av, at tær vórðu føddar so tíðliga. Teir upplýstu eisini, at Rumaisa vigar góð tvey pund nú.

Foreldrini greiddu tíðindafólkunum frá, at navnið Rumaisa merkir "hvít sum mjólk", og at Hiba merkir "gáva frá Guði".

# Framvegis nógvir gíslar í Irak

**Tveir franskir tíðindamenn komu í gjár heim eftir at hava verið gíslar í Irak í fýra mánaðir. Men minst 24 útlendingar og fleiri irakar sita framvegis gíslar í Irak**

GÍSLAR

*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Jacques Chirac, forseti, breyt jólafrítíðina í Marokko av, so hann kundi fara til París at taka ímóti Christian Chesnot og Georges Malbrunot. Saman við teimum var Michel Barnier, uttanríkisráðharri, sum var farin til Bagdad at taka ímóti teimum.

Teir báðir tíðindamenninir vórðu burturfluttir í Irak fyri fýra mánaðum síðani, og tey flestu høvdu mist vónina um at síggja teir aftur á lívi. Nógvir fransmenn litu kortini á, at menninir fóru at koma afturíaftur, tí Frakland var so hart ímóti álopinum á Irak.

Burturflytararnir kravdu, at franska stjórnin skuldi ógilda lógina, sum millum annað banar muslimskum skúlanæmingum í Fraklandi at hava turriklæði á høvdinum, men tað vildi stjórnin ikki. Tað er ikki greitt, um Frakland er gingið undir aðrar treytir fyri at fáa menninar leysar.

Higartil í ár eru 120 útlendingar vorðnir burturfluttir í Irak. Minst 41 teirra hava latið lív, og minst 24 eru franvegis gíslar. Talan er yvirøvur um fólk úr arabiskum og afrikonskum londum, men tey hava ikki fingið somu umrøðu í altjóða fjølmiðlunum sum teir báðir fronsku gíslarnir, skrivar Reuter.

Nógvir irakar eru eisini burturfluttir. So seint sum seinasta sunnudag vórðu 10 irakar burturfluttir. Teir arbeiddu fyri eitt saudiarabiskt felag, sum ger ymsar uppgávur fyri amerikanska herin í Irak.